## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum,
sum á ymiskan hátt mintust meg
á 70 ára føðingardegi mínum.

**Alma Petersen**

---

✝

Kunngjørt verður at okkara kæra mamma,
vermamma, omma og langomma

**Lena Olsen**

ættað úr Tjørnuvík

andaðist týsdagin 30. september í Eldrasambýlinum
í Vestmanna, 98 ára gomul.

Jarðarferðin verður leygardagin 4. oktober
kl. 14.00 úr Adventistakirkjuni í Havn.

*Familjunnar vegna*

**Súnfríða**

Tey, ið vilja minnast Lenu, kunnu ístaðin fyri blómur ella krans lata eina peningagávu til hjálparfelagsskapin hjá Adventistasamkomuni ella til Eldrasambýlið í Vestmanna, konto í Føroya Banka.

# Hansina í Listaskálanum

Tann fyrsta einkarframsýningin í Føroyum hjá Hansinu Iversen letur upp í Listaskálanum í Havn leygardagin 4. oktober. Framsýningin er opin til 26. oktober.

Framsýningin er gjørd til Listaskálan. Hon er í einum rúmi í tí sonevnda gamla partinum í Listaskálanum.

Í innbjóðingini til ferniseringina, sum verður leygardagin klokkan 16, skrivar Hansina Iversen: Myndirnar, sum her hanga, eru gjørdar við hesum rúminum í huga. Strokini, litirnir og formarnir fevna rúmið við rørslu, sum ikki endar ella byrjar...

Hansina hevur givið framsýningini heitið »Strok«. Hon hevur havt heitið í huga av tí, at orðið hevur fleiri týdningar, til dømis síggjast penslastrokini væl á løriftinum, og so sjálvandi tað, sum eyðkennir listafólk yvirhøvur: Hugflogið strýkur og sveimar.

Á framsýningini eru 19 málningar. Hansina hevur brúkt olju á lørift.



Hansina Iversen, sum er 37 ára gomul, hevur útbúgving frá listarskúlum í Íslandi og Finnlandi. Hon er úr Havn, men er nú búsitandi í Keypmannahavn.

Hansina hevur verið við á fleiri ólavsøkuframsýningum og várframsýningum umframt summarframsýningum í Norðurlandahúsinum. Í útlondum hevur hon havt síni verk við á Den Frie í Keypmannahavn, í Berlin, Helsinki og Reykjavík.




# Handverkarar royna at smíða nýggjan sáttmála

**Enn er einki úrslit komið burtur úr samráðingunum millum Handverksmeistrafelagið og handverkarafeløgini**

Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna samráðast saman um nýggjan sáttmála við Føroya Handverksmeistarafelag. Havnar Handverkarafelag er limur í Landsfelag Handverkaranna.

Verandi sáttmáli fór úr gildi týsdagin á midnátt, og síðani miðskeiðis í september mánaði hava partarnar tosa saman um nýggjan sáttmála, men enn er eingin semja gjørd.

Eftir tvey samráðingarumfør komu semingsmenninir upp í samráðingarnar, nú sáttmálin gekk út 30. september. Semingsmenninir útsettu eitt møguligt verkfall til 8. oktober á midnátt.

Tá ið semingsmenninir komu upp í samráðingarnar var støðan tann, at meistararnir vildu lata 1,08 í lønarhækking í ár og tað sama næsta ár. Hetta vildu handverkararnir ikki góðtaka.

Samráðingarnar hava ligið stillar, men nú verður bíðað eftir, at nýggir semingsmenn taka samráðingarnar uppaftur.



Álit um diabetes handað heilsumálaráðharranum:

# Diabetikarar fáa betri umstøður

**Fyri 1,4 milliónir skulu nýggj stig takast fyri typu 2 diabetikarar í Føroyum við øktum ambulatoriivirksemi, regluligari starvsundirvísing, øktari upplýsing, diabetesskúla, bóklingi og øðrum. Hetta eru tilmælini frá arbeiðsbólki, sum hósdagin 1. september handaði heilsumálaráðharranum Bill Justinussen álit um typu 2 diabetes sjúkuna**

DIABETES
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Jens Andreassen, deildarlækni, hevði framløgu vegna arbeiðsbólkin, sum hósdagin handaði Bill Justinussen álit um typu 2 diabetes. – Lívið hjá einum sjúklingi kann leingjast við 20 árum, fáa teir viðgerð, og tað er m.a. okkara uppgáva, segði Jens Andreassen*

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Bill Justinussen, setti 29. januar 2003 ein arbeiðsbólk at gera álit um viðgerðarviðurskiftini hjá sjúklingum við typu 2 diabetes. Flestu diabetikarar hava typu 2 diabetes, sum er ein veikari útgáva enn typa 1 og tískil eisini torførari at uppdaga og staðfesta.

Hósdagin 1. september handaði arbeiðsbólkurin landsstýrismanninum álitið, og Jens Andreassen, deildarlækni á Landssjúkrahúsinum, helt fyrilestur um úrslit og tilmæli, bólkurin er komin fram til í arbeiðinum.

### 20 ár uppá spæl

Í lýsingunum av viðgerðartørvinum hjá typu 2 diabetikarum er sambært álitinum ein høvuðsstrupulleiki, at sjúkan ofta verður seint staðfest og uppdagað, ofta eftir at hon hevur gjørt um seg í 10 ár.

- Við viðgerð kann lívið hjá einum diabetikara leingjast við umleið 20 árum, umframt at lívsgóðskan kann økjast munandi, og tískil stendur nógv uppá spæl, segði Jens Andreassen í fyrilestri sínum hósdagin í Heilsumálaráðnum.

Á henda hátt leggur arbeiðsbólkurin stóran dent á undirvísing og upplýsing av typu 2 diabetes, har sjúklingurin fær innlit í álvarsligu sjúkuna og kann taka støðu til tey mongu medisinsku viðgerðartilboðini, sum í dag kunnu veitast og standa sjúklinginum frítt í boði.

Umframt undirvísing og upplýsing er eftirlit sambært arbeiðsbólkinum ein týðandi partur, og eigur hvør sjúklingur sambært reglunum at kannast fýra ferðir um árið. Vekt, feittinnihald, nýru, blóðtrýst, elektrokardiogram (EKG) og miðalblóðsukur eru nøkur dømi um, hvat læknar eiga at hava eftirlit við hjá einum diabetikara.

### Ambulatorriivirksemi í Klaksvík og Suðuroy

Eftir at hava lýst viðgerðartørvin hjá typu 2 diabetikarum í Føroyum vísti Jens Andreassen á nakrar ítøkiligar broytingar, bólkurin skjýtur upp í álitinum.

- Ein av niðurstøðunum er at fáa sett á stovn ambulatoriivirksemi í Klaksvík og Suðuroy í tøttum samstarvi við Landssjúkrahúsið, umframt at ambulatoriivirksemið í Havn verður økt við samsvarandi uppnormeringum, vísti Jens Andreassen á.

Umframt hetta eru onnur tilmæli í álitinum at skipa regluliga undirvísing fyri starvsfólk tengd at økinum, at seta á stovn diabetesskúla og skapa møguleikar fyri elektroniskum diabetesjournali, og eisini ynskir arbeiðsbólkurin at gera ein bókling til diabetikarar og at kunna veita sjúklingum elektrofysiologiska kanning av hjartanum.

Jens Andreassen greiddi víðari frá, at diabetesambulatoriini skulu profilerast eftir førimuni við kostráðgevum, diabetessjúkrarøktarfrøðingar og læknum.

### 2400 tilburðir í Føroyum

Hóast eingi ávís tøl eru gjørd í Føroyum, vísti Jens Andreassen við støði í donskum hagtølum á, at umleið 2400 typu 2 diabetikarar kunnu væntast at vera í Føroyum.

- Samanbera vit við danir eru í dag 1200 typu 2 diabetikarar í Føroyum, sum eru tilvitaðir um sjúkuna, og aðrir 1200 sjúklingar, sum ikki vita, at teir hava álvarsomu sjúkuna, segði Jens Andreassen í framløguni vegna arbeiðsbólkin.

Lagt varð afturat, at málið júst er at fáa upplýst og staðfest sjúkuna skjótast gjørligt, tí diabetes sjúklingar uttan viðgerð doyggja alt ov tíðliga av heila og hjartatrupulleikum.

### Bill vil fremja broytingar

Eftir fyrilesturin hjá deildarlæknanum tók heilsumálaráðharrin Bill Justinussen stutt orðið, og vísti hann á takksemi sítt fyri álitið og vísti í sama viðfangi á, at Heilsumálaráðið ynskir at fremja broytingar og virka fyri framstigum á økinum.

- Vit fara aktivt at arbeiða fyri, at tilmælini frá arbeiðsbólkinum verða gingin á møti og tiltøkini sett í verk, og eftir mínum tykki er talan um ein bíligan og góðan pakka, arbeiðsbólkurin er komin fram til, vísti Bill Justinussen á.

Sostatt er allar orsøkir at vænta mennandi átak frá politiskari síðu í framtíðini, og skulu tilmælini fylgjast hjá arbeiðsbólkinum skal 1,4 millión nýtast at basa typu 2 diabetes í Føroyum í framtíðini.

**Samlaðar útrokningar frá arbeiðsbólkinum um nýggjar ætlanir:**

| Tiltak | Útreiðslur tilsamans |
|---|---|
| Diabetesambulatorium/Suðuroyar Sjúkrahús | 257.989,14 |
| Diabetesambulatorium/Klaksvíkar Sjúkrahús | 278.609,52 |
| Diabetesambulatorium/Landssjúkrahúsið | 851.324,74 |
| Diabetesskúli | 70.000,00 |
| Diabetesbóklingur | 20.000,00 |
| Elektronisk journal | |
| Sálarlækni/-frøðingur | |
| Tilsamans | 1.477.923,40 |

# Havnarkórið á Norðurlandaferð

**Leygardagin fer Havnarkórið at framføra kór- og dansiskrá í Kommunuskúlahøllini í Havn**

Sum fyrr fráboðað hevur Havnarkórið havt í umbúna at gera eina konsertferð til skandinavisku høvuðsstaðirnar, og við góðari undirtøku frá sangarum og peningajáttandi myndugleikum, stovnum og fyritøkum verður ferðin, sum gongur yvir Keypmannahavn, Uppsala, Stockholm, Helsinki og Oslo, nú veruleiki í tíðarbilinum 9.-19. oktober.

Havnarkórið hevði konsertir seinasta vikuskifti, har fólk fingu høvi at hoyra tað, sum kórið fer at framføra í kirkjum á hesari rundferð. Í morgin býður kórið aftur til konsert. Hesaferð er tað verðsliga skráin, sum verður at hoyra. Umframt at syngja løg og satsir eftir Jógvan Waagstein, Alexander Enniberg, Hans J.Højgaard, Knút Olsen, Hans E. í Brekkunum, Kára Bæk, Bjarna Restoff, Paula í Sandagerði, Sunleif Rasmussen, Vagn Holmboe, Karl Clausen og eisini europeiskar og norðurlendskar kórsatsir, fer Havnarkórið sum vant á uttandsferð tess at sýna fram føroyskan dans við dansispølum.

Konsertin í morgin verður í Kommunuskúlahøllini kl. 16.00.

